# Amnesty: – Føroyar kunnu enda í svørtu bók

**– Vit sleppa ikki málinum, fyrr enn løgtingið broytir revsilógina, so at hon eisini fevnir um kynsligan samleika, sigur Margretha Nónklett, samskipari hjá Amnesty International, Føroya Deild. Hon óttast fyri, at Føroyar enda í ársfrágreiðingini hjá Amnesty, um ikki lógin verður broytt**

SAMKYND
*Finnur Jensen*
*finnur@sosialurin.fo*

Føroyadeildin hjá Amnesty International leggur nú trýst á løgmann og politisku flokkarnar fyri at fáa tey samkyndu vard í mannamunsgreinini í revsilógini. Felagsskapurin hevur sent løgmanni og politisku flokkunum eitt bræv, har harmast verður stórliga, at løgtingið í vetur feldi uppskotið um at broyta revsilógina, so at hon eisini fevnir um kynsligan samleika.

– Vit gera alt, sum vit kunnu, fyri at ávirka politisku skipanina, so tey samkyndu kunnu vera vard í revsilógini, eins og tey eru tað í grannalondum okkara, sigur Margretha Nónklett, samskipari hjá Føroyadeildini hjá Amnesty International.

Hon sigur seg fegnast um, at løgmaður hevur sagt sína hugsan um málið, men hon heitir samstundis á løgmann um meira aktivt at heita á tingmenn um at atkvøða fyri uppskotinum, sum tjóðveldistingmenn hava lagt fyri løgtinginum.

### Kunnu enda í svørtu bók

Føroyadeildin hjá Amnesty vil gera alt fyri, at Føroyar ikki enda í ársfrágreiðingini hjá Amnesty International. Hendan ársfrágreiðingin kann sammetast við eina svørtu bók, har víst verður á tey lond, har mannarættindaviðurskiftini ikki eru í lagi.

– Tað hevði verið sera óheppið og ein stór skomm fyri Føroyar. Í ringasta føri kann tað oyðileggja føroyska umdømið, metir samskiparin hjá Amnesty International.

Margretha Nónklett vísir á eitt líknandi dømi, har Pólland endaði í nýggjastu ársfrágreiðingini, har tað er eitt líknandi rák, sum er í Føroyum. Pólland bannar samkyndum at hava skrúðgongur. Eitt annað dømi er Danmark, sum endaði í frágreiðingini í sambandi við isolatiónsfongsling, har kritikkurin snúði seg um ovurnýtslu av langtíðar avbyrgingum. Fólk sótu ov leingi avbyrgd, varð mett. Tað bleiv eitt ramaskríggj í Danmark, og tað endaði við, at viðurskiftini vórðu bøtt.

### Sleppa ikki málinum

Samskiparin hjá Amnesty International í Føroyum vónar, at politikarar atkvøða fyri uppskotinum, men gongur hetta ikki, so gevst felagsskapurin ikki so.

– Vit sleppa ikki málinum, fyrr enn løgtingið broytir revsilógina, so at hon eisini fevnir um kynsligan samleika. Verður tað ikki meiriluti fyri at broyta lógina, so mugu vit umhugsa, hvat vit skulu gera, sigur Margretha Nónklett, ið ikki avvísir, at tað kann enda við einum altjóða trýsti frá hinum deildunum í Amnesty International.

Í ringasta føri enda Føroyar enda í svørtu bók hjá Amnesty, men hetta er hvørki nakað, sum samskiparin vónar ella væntar.




*– Tað hevði verið sera óheppið og ein stór skomm fyri Føroyar. Í ringasta føri kann tað oyðileggja føroyska umdømið, um løgtingið vrakar uppskotið um at broyta revsiógina, so at hon eisini fevnir um kynsligan samleika, metir Margretha Nónklett, samskipari hjá Føroyadeildini hjá Amnesty International*

# Løgmaður avvísir partroling

**- Eg havi givið mína hugsan til kennar, men tingmenn hava fría rætt at hava sína egnu støðu. Eisini javnaðartingmenn, sigur Jóannes Eidesgaard, løgmaður, ið væntandi fer at kalla lítlu samgongu til fundar at umrøða málið um tey samkyndu**

SAMKYND
*Finnur Jensen*
*finnur@sosialurin.fo*



*– Eg kann ikki forða fyri, at nakrir tingmenn í flokkinum hava eina aðra hugsan, sigur Jóannes Eidesgaard, sum viðgongur, at tað er óheppið, at nakrir javnaðartingmenn eru ósamdir við yvirlýsingina hjá flokkinum, har sagt verður, at samkynd skulu vera vard í mannamunsgreinini í revsilógini*

Jóannes Eidesgaard, løgmaður, fegnast um, at Amnesty International í brævi heitir á politiska myndugleikan um at broyta revsilógina, so at hon eisini fevnir um kynsligan samleika.

– Eg vóni, at tingmenn taka áheitanina til eftirtektar, soleiðis at tey samkyndu eisini verða fevnd í mannamunsgreinini í revsilógini, sigur Jóannes Eidesgaard.

Margretha Nónklett, samskipari hjá Amnesty í Føroyum, hevur givið til kennar, at brævið eisini er ein áheitan á løgmann um at gera sín aktiva lut fyri, at uppskotið verður samtykt.

Hesa áheitan hevur løgmaður tikið til eftirtektar.

– Eg ætli mær at taka hetta málið upp í lítlu samgongu fyri at vita, um vit kunnu finna eina loysn. Eg veit, at málið viðkvæmt, og tað verður torført at finna eina semju, men tað er ikki óhugsandi, at vit finna eina loysn, sigur Jóannes Eidesgaard.

### Alternativ samgonguloysn

Fleiri samgongulimir, sum Sosialurin hevur prátað við, hava givið til kennar, at teir ynskja, at samgongan finnur eina felags loysn á málinum.

Tann loysnin tykist ikki vera heilt í tráð við uppskotið, sum tingmanningin hjá Tjóðveldisflokkinum hevur lagt fram. Tað uppskotið snýr seg um at fáa skoytt »kynsligan samleika« upp í mannamunsgreinina í revsilógini eins og í grannalondunum.

Ein loysn, ið bæði tinglimir hjá Fólkaflokkinum og Sambandsflokkinum hava nevnt, er fullkomiliga at strika minnilutarnar í mannamunsgreinini, soleiðis at greinin verður generell og fevnir um øll.

Jóannes Eidesgaard metir ikki, at ein sovorðin generell orðing dekkar nóg væl, men hann avvísir ikki, at loysnin – um hon er nóg góð – kundi verið tað, ið skal til fyri at fáa eitt samt løgting.

### Sær onga andsøgn

Javnaðarflokkurin er ikki samdur í málinum. Seinastu ferð atkvøddu tríggir javnaðartingmenn ímóti uppskotinum, sum fall við 20 atkvøðum ímóti. Kortini hevur Javnaðarflokkurin sent út eina yvirlýsing, har flokkurin sigur seg vera fyri, at samkynd verða vard við lóg.

Hetta hevur elvt til hvassar atfinningar. Ein andsøgn, vilja fleiri vera við. Millum annað hevur Sjúrður Skaale í einum lesarabrævi skýrt løgmann fyri at partrola, men hesum vil løgmaður ikki vera við.

– Eg havi givið mína hugsan til kennar, men tingmenn hava frían rætt at hava sína egnu støðu. Eisini javnaðartingmenn. Javnaðarflokkurin hevur í øllum førum tikið eina støðu. Men eg kann ikki forða fyri, at nakrir tingmenn í flokkinum hava eina aðra hugsan, sigur Jóannes Eidesgaard.

Hann viðgongur tó, at tað er óheppið, at tingmenn eru ósamdir við yvirlýsingina hjá flokkinum.

– Men tað er eingin stórvegis trupulleiki, metir Jóannes Eidesgaard, ið tó fer at fylgja áheitanini hjá Amnesty um at broyta støðuna hjá teimum tingmonnum, ið atkvøddu ímóti.